

*Millum skeiðluttakararnar var eisini landsverkfrøðingurin, Henning Jacobsen, sum herfyri eisini gjørdist limur í Oljuráðleggingarnevndini. Her er hann saman við øðrum skeiðluttakarum. Mynd kalmar*

*Føroya Oljuídnaður og Phillips skipa fyri oljuskeiði:*

# -Bíðið við at gera íløgur í oljuvinnu

*– Tað er skilagott og rætt at kunna seg við mongu spurningarnar í eini oljuvinnu, men míni ráð til føroyingar eru hesi: gerið ikki í núverandi støðu íløgur í eina oljuvinnu. Tað er góð tíð til tað. Brúkið heldur egnar ressursir til at fáa vitan og førleika í verandi støðu sigur Kjell Søiland frá Phillips Petroleum, sum hevur hildið skeið fyri 60 føroyingum á Hotel Hafnia seinastu dagarnar. Hann heldur eisini tað er ómetaliga týdningarmikið ikki at seta alt annað til síðis fyri eina oljuvinnu. Gloymið ikki fiskivinnuna sigur hann við Tíðindablaðið Sosialin*

Jan Muller

Eg eri sera væl nøgdur við hesar báðar dagarnar. Tað er hugaligt at síggja, at fólk úr so mongum ymsum bransjum og herðashornum í føroyska samfelagnum hava verið á skeiðnum og lurtað og eisini sett spurningar.

Sigur Kjell Søiland, frá Phillips Petroleum í Noregi sum hesar seinastu tveir dagarnar hevur hildið skeið fyri umleið 60 føroyingum í sambandi við eina komandi oljuvinnu.

Tað eru oljufelagið Phillips og Føroya Oljuídnaður, sum hava tikið stig til hetta skeiðið, ið hevur havt til endamál at kunna um innihaldið í teimum mongu sáttmálum, sum eru galdandi millum oljufeløg og tænastuveitarar av ymsum slag.

Seminarið var fyri limir í Føroya Oljuídnað og var serstakliga ætlað ráðgevandi fyritøkum í løgar- og fíggingarspurningum og umboðum fyri virki, ið fáast við sølu av vørum og tænastum.

**Altíð gott at tosa um tingini**

Vit spurdu Kjell Søiland um tað ikki er alt ov tíðliga longu nú at skipa fyri einum slíkum skeiði?

-Tað er altíð gott at tosa um tingini, og ætlanin er sjálvandi ikki at gera nakran til sertrøðing á hesum økinum nú, men hetta skeiðið er meira fyri at geva fólki, sum virka nógva staðni í samfelagnum, eina kenslu av, hvat hetta er fyri ein nýggj verð.

Hann vísir á, at tað ber sjálvandi til seinni, tá tað er meira greitt við eini møguligari oljuvinnu, at fáa meira at vita, men í løtuni kann vera gott at hava eina hugmynd av, hvat hetta uppgávuøkið snýr seg um.

Á skeiðnum hevur verið tosað um, hvat slag av sáttmálum verður brúkt í oljuvinnuni, hvussu sáttmálaklausular virka og hvat teir bera í sær og síðani prekvalifisering av tænastuveitarum tvs. hvørjar fortreytir eru neyðugar fyri at kunna láta vørur og tænastur til oljuvinnuna.

**Gerið ikki íløgur nú**

Men hvørji ráð hevur so Kjell Søiland at geva føroyingum í sambandi við eina komandi oljuvinnu?

-Gerið ikki íløgur og brúkið ikki nógvar pengar í núverandi støðu. Brúkið heldur ikki ov nógv av fremmandum ráðgevum men brúkið av tykkara egnu ressursum. Takið tað eitt sindur róligt nakað afturat, tí tað er góð tíð til alt hetta.

Kjell Søiland heldur, at føroyingar hava enn góða tíð til at fyrireika seg til eina møguliga oljuvinnu, og hann heldur tí tað er umráðandi, at vit ikki gera nakrar stórar íløgur nú, tí enn er eingin vissa fyri, at nøkur olja er til.

*Meinar tú harvið, at tað er ov tíðliga av føroyskum ídnaði at fyrireika seg til eina oljuvinnu?*

Nei avgjørt ikki, men eg sigi bert: brúkið egnar ressursir - farið ikki út og keypið tykkum dýra ráðgevarahjálp. Tað verður avmarkað við virksemi í leititíðini, og tí eiga tit eisini at fara fram varliga - stig fyri stig.

**Ringvirkningar**

Kjell Søiland vísir tó á, at tað í eini leitingarfasu verður fítt av virksemi og bara hetta, at tað t.d. fara at vera einir tveir borpallar á føroyskum øki, fer at hava stórar ringvirkningar í einum so lítlum samfelag sum tí føroyska.

Men verður olja funnin, so fer at verða eitt stórt trýst á alt samfelagið. Og hetta er sjálvandi nakað, sum tú mást taka hædd fyri - og her ikki minst politikararnir.

➜



*Pauli Einarson frá Føroya Oljuídnaði og John Jewhurst, Jakob Rugland og Kjell Søiland frá Phillips sum hava fyrireikað hetta eitt hitt fyrsta oljuskeiðið fyri føroyskum vinnulívsfólk, stovnsleiðarar, advokatum og. Mynd kalmar*



*Fleiri av skeiðluttakar-unum. Mynd kalmar*

*Men heldur tú, at ein oljuvinna fer at hava óhepnar eins væl og hepnar avleiðingar fyri eitt so lítið samfelag?*

-Tað verður heilt upp til politisku myndugleikarnar at finna eina javnvág. Teir mugu ansa eftir, at ikki alt bara fer at snúgva seg um olju. Teir eiga eisini at taka hædd fyri fiskivinnuni. Olja má ikki sleppa at vera alt-ráðandi men eitt íkast til samfelagið. Tað ivist eg onga løtu í, at føroyskir politikarar eru greiðir yvir.

Umframt Kjell Søiland hava eisini Jakob Rugland, sum er umboð Phillips í Føroyum, og John Jewhurst, sum starvast hjá Phillips í Bretlandi verið við á skeiðnum.


Hjartaliga vælkomin til

FELAGSFUNDIRNAR

í døgunum 15.-17. november

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjakvøldið | kl. 20.00 | í Evangeliihúsinum |
| Leygarkvøldið | kl. 20.00 | í Filadelfia |
| Sunnumorgunin | kl. 11.00 | í Filadelfia |
| Sunnukvøldið | kl. 18.00 | í Evangeliihúsinum |

HVÍTUSUNNUSAMKOMURNAR
Evangeliihúsið og Filadelfia

S/pf. Handilsvirki
HÓGV
660 Søldarfjørður
Okkara tlf. & fax. no eru
Tlf. 41 963 Fax 42 025

GRAV-STEINAR





Sera bíligir grav-steinar kunnu fáast við at venda sær til:
Tlf. 71345
ella 71687

Til sølu
Fiat Uno 55, árg. 84
Opel Omega GL 1.8i, árg. 88
Peogeot 205
Bilumvæling
Tlf. 84448

DANNY TRANSPORT
– tá okkurt skal koyrast ella goymast
Tlf. 19192


*Jørgen Niclasen, tingmaður:*

# – Eilif Samuelsen ger alt ov nógv av

*– Hatta líkist ikki sørt einum spæli fyri gallarínum, heldur Jørgen Niclasen, løgtingsmaður.*

Magnus Dam
úr Keypmannahavn

Síðani Eilif Samuelsen kom út í Tinganes, eru útreiðslurnar til skúlamál bara blivnar størri, og tí haldi eg, at Eilif ger nakað nógv av yvir fyri Lisbeth Petersen.

Hetta sigur Jørgen Niclasen, tingmaður fyri Fólkaflokkin, í samband við at landsstýrismaðurin í kommunumálum Eilif Samuelsen, ikki góðtekur fíggjarætlanina hjá Tórshavnar kommmunu har Lisbeth Petersen úr Sambandsflokkinum er býráðsformaður.

Tí eigur Eilif at umhugsa sína viðferð av málinum, og hvørt hann skal kasta við grót ella ikki, tá ið hann sjálvur býr í glashúsi, leggur Jørgen Niclasen afturat.

Tað er so lætt hjá Eilif at siga við kommunurnar, at tær ikki skulu økja um útreiðslurnar og heldur gjalda skuldina aftur. Sjálvur skal hann landsstýrisins vegna ikki gjalda eitt oyra í avdrøgum uppá uttanlandsskuldina, tí soleiðis er avtalan við danir.

Á nøkrum økjum sker landsstýrið útreiðslurnar niður, og á øðrum verður settur meiri peningur av á fíggjarlógini. Útreiðslurnar til skúlamál hækkaðu í fjør, og tær hækkað aftur í ár. Tað er júst hetta, eg haldi verða skeivt. At samstundis sum Eilif vil hava komunurnar at brúka minni pening, brúkar hann sjálvur meiri pening í eini tíð, har útreiðslurnar helst ikki skulu verða ov stórar.

Jørgen Niclasen hevur tó alla virðing fyri, at Eilif vil hava kommunurnar at gjalda skuldina aftur, og ikki minst at Tórshavnar Kommuna, sum skyldar umleið 600 milliónir, roynir at gera sítt til tess at minka um skuldina.

Men eg kann ikki láta verða við at hugsa tankan um, at alt hetta bert er eitt spæl fyri gallarínum í samband við býráðsvalið um tríggjar vikur, har Lisbeth Petersen er uppstillað, sigur Jørgen Niclasen.

Eilif Samuelsen hevur gjørt púra greitt, at Landsstýrið ikki ætlar at bakka í hesum málinum.

- Hetta er ikki ein spurningur um persónar, og tað kann verða líka mikið, um býráðsformenninir ymsa staðni eru sambandsmenn ella ikki. Allar kommunur fingu í góðari tíð at vita hvussu fíggjarætlanin skuldi verða. Og Landsstýrið kann ikki góðtaka fíggjarætlanina hjá Tórshavnar kommunu, tí hon lýkur ikki tær treytir, Landsstýrið hevur sett, sigur Eilif Samuelsen við Sosialin.


Frá Hollywood
Fríggjakvøldið spæla
Rúni og Fróði
góðan country-dansitónleik
HOLLYWOOD
– stað teirra tilkomnu –

Veðurtænastan á Veðurstøðini
Upplýsingar um veðrið á veðurstøðunum kunnu fáast við at ringja á tlf. 12210.

NÝTT
frá Hollywood
Komandi leygarkvøldið verður
almennur føroyskur dansur
Tað er dansifelagið »Tøkum lætt«, sum skipar fyri.
Øll eru hjartaliga vælkomin.
Eisini verður høvi at keypa sær okkurt at eta í Skáanum.
HOLLYWOOD
– stað teirra tilkomnu –